

# Brugdan stóran týdning fyri Atlantic Petroleum

Jan Müller

12.05.2014 - 21:17

Oljan.fo

Heimspressan hevur í hesi løtu tíðindi um, at hol nú aftur verður sett á føroysku undirgrundina. Hetta kemur í kjalarvørrinum á, at eitt av feløgunum í boringini á landgrunninum, føroyska Atlantic Petroleum í síni fráboðan til virðisbrævamarknaðin hevur kunnað um, at arbeiðið á Brugdan 2 leitimiðinum er farið í gongd aftur. Og stjórin í felagnum, Ben Arabo dylur heldur ikki fyri, at úrslitið av boringini kann fáa sera stóran týdning fyri felagið.

"Vit eru sera fegnir at kunna boða frá, at arbeiðið at fara undir aftur at bora Brugdan 2 brunnin í Føroyum er byrjað. Hóast brunnurin bæði jarðfrøðiliga og tøkniliga er ein stór avbjóðing, so kann hann, um hann eydnast, hava sera stóra ávirkan á Atlantic Petroleum og føroyska landgrunnin sum heild."

Hetta stendur at lesa í fráboðan frá Atlantic Petroleum á altjóða virðisbrævamarknaðum og nú eisini í heimspressuni úr Kina til USA. Brugdan 2 eisini kend sum 6104/21-2 varð

borað í 2012 og tá fráfarin orsakað av veðrinum. Nú verður so farið aftur í boriholið við boripallinum West Hercules á 460 metra dýpi.

Boristaðið er í sama jarðfrøðiliga umhvørvi, har Brugdan 1 varð borað í 2006 men sum ikki náddi niður á Vaila sandstein-málið av mekaniskum orsøkum, sum tað stendur í fráboðanini.

Tað fer at taka góðar tveir mánaðir at bora Brugdan 2 lidna.

Atlantic Petroleum eigur 1% av brunninum, meðan Statoil hevur 35%, ExxonMobil 49% og OMV 15%. Herfyri seldi Statoil 15% til OMV.